# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Dávur Juul Magnussen, Hoyvík:

## Heiðraður av borgarstjóranum

Tórshavnar kommuna fegnast um at Dávur Juul Magnussen, í kappingini „Spil for livet“ í Keypmannahavn, hevur umboðað Tórshavnar musikkskúla so hegnisliga.

Í hesum sambandi var hugnaløta hjá borgarstjóranum, har hann fekk handað blómutyssi og eina lítla gávu.

Dávur var og vitjaði á býráðnum í Havn, saman við lærara sínum Kenneth Jones og leiðaranum á Tórshavnar Musikkskúla, Bo Isholm.

Borgarstjórin ynskti Dáva alt tað besta, nú hann eftir summarfrítíðina byrjar á tónleikaháskúla í Glasgow.



*Dávur Juul Magnussen fekk handað blómutyssi og eina lítla gávu frá borgarstjóranum Heðini Mortensen*

## Andlát og jarðarferðir

**André Mellemgaard Jacobsen úr Klaksvík** andaðist á Norðoya Røktarheimi, týsdagin 24. januar, 83 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Richard Thomsen úr Havn**, ættaður úr Sumba, andaðist leygardagin 21. januar á Landssjúkrahúsinum, 73 ára gamal. Kistan fór úr Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 24. januar klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni mikudagin 25. januar kl. 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Regin Hansen, Nykøbing Falster**, ættaður av Kjalnesi í Kollafirði, andaðist sunnudagin 22. januar, 71 ára gamal.

## Kvinnurnar hjá Jógvan Asbjørn í Focus



*Fríggjadagin letur upp málningaframsýning við Jógvan Asbjørn Skaale í Gallerie Focus í Havn*

Fríggjadagin letur upp málningaframsýning við Jógvan Asbjørn Skaale í Gallerie Focus í Havn. Evnið er »Kvinna og bygdalag«

Fríggjadagin kl 16 til 18 letur ein framsýning við málningum hjá Jógvan Ásbjørn Skaale upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn.

Jógvan Ásbjørn Skaale í Havn, sum er føddur í 1947, hevur málað og arbeitt við list í nógv ár, heilt frá ungum árum luttók hann á framsýningum og gjørdi serliga vart við seg á Ólavsøkuframsýningunum sum Listafelagið skipaði fyri.

Jógvan Ásbjørn er útbúgvin lærari. Hann er mest kendur fyri at stríðast fyri, at vit fingu føroyskt sjónvarp og bleiv hann fyrsti stjórin í Sjónvarpi Føroya. Í dag er Jógvan Ásbjørn, kallaður JAS millum vinir, kendur fyri at mála kvinnumyndir.

– Nú, vit hava tann heiður, at hann hevur málningaframsýning í Galerie Focus, er myndevnið kvinna og bygdalag, sigur Marianna Norðoy á Gallarie Focus.

Framsýningin verður opin til 10. februar, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, ið sýndu samkenslu, tá kæri pápi, abbi, verfaðir og maki

**Henning Eysturoy**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður

Tøkk fyri blómur, kransar, gávur til Kiwanis og hjálpsemi við ervinum.
Vit takka øllum, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Marta**
**Herman, Erling, Sonja og Heini**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá góða mamma, vermamma og omma okkara

**Solveig Jespersen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til heimahjálpir og sjúkrasystrar, sum vóru um hana, bæði heima og á Sambýlinum.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar, berarar, gravarar og tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferð og ervið.
Tøkk fyri blómur, kransar og minningargávur til Sambýlið og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Manbjørn og Emi**